Eitt ljós á gøtu míni

v/ P. J. Sigvardsen

Minnist til konu Lots

Tað er Jesus sjálvur, ið kemur við hesi álvarsomu áminning til lærusveinar sínar, tá ið hann á fyrsta sinni boðar um afturkomu sína. Honum nýttist bert at siga: »*Minnist til konu Lots*«, so vitstu øll, hvat hann hugsaði um, tí hennara syndarligu útgongd kendu tey til fulnar.

Veruleikin var í stuttum tann, at synd og gudloysi var vorðið so ovurmikið í Sódoma og Gómorru, at Harrin setti sær fyri at oyða hesar staðir, funnust har ikki 10 rættvís í staðnum. Men sjálvt um Ábraham gekk í forbøn fyri frænda sínum Lot, so var ikki bót á borðið, tí tað funnust ikki so frægt sum 10 rættvís í allari Sódomu.

Men til tess at tey fáu rættvísu skuldu farast saman við teimum gudleysu, sendi Gud tveir av einglum sínum at noyða Lot, konu Lots og báðar døtur teirra at flýggja út úr Sódomu, áðrenn staðurin varð týndur. Tey lótu sær eftirlíka — um enn treyðugt, og fóru í evstu løtu út úr tí deyðadømda býi.

Á leiðini gav Harrin teimum tey boð, at tey hvørki máttu líta aftur um bak ella steðga nakrastaðni á slættanum, men halda leiðina beint til Zoar, um teimum skuldi verða lív lagað.

Men tráanin eftir Sódomu og lívinum har var so sterk í konu Lots, at hon steðgaði á, leit aftur um bak og fórst saman við Sódomubúgvum.


Tí sigur Jesus við okkum í dag: »*Minnist til konu Lots!*« Hon hoyrdi Guds kallandi rødd, ið bað hana standa upp og flýggja frá synd og gudloysi og ganga tann veg, sum Harrin vísti henni. Hon byrjaði at ganga eftir tí mjáa vegnum, ið ber til lívið; men so steðgaði hon á og fullrann ikki skeiðið. Orsøkin var tann, at hon heldur vildi njóta hitt syndafulla lívið í Sódomu og ivasomu gleði tess eina skamma stund enn frelsu og bjarging undan oyðingini.

Kona Lots man ikki vera tann einasta í so máta. Hetta er lutur alra teirra, ið bóru seg at eins og henda kvinnan. Tað mundu vera so mong, ið hoyrdu Guds kallandi rødd í ungdóms- og manndómsárum. Tey fóru á føtur og vildu flýggja frá synd, ólevnað, ja øllum gudloysi, og so byrjaðu tey eins og tann burturfarni sonurin at ganga móti faðirhúsinum.

Summi gingu styttri, onnur longri, men felags fyri mong var, at tey steðgaðu á slættanum eins og kona Lots, tí tey lótu seg tøla av heimsins girndum og fagnaði. Og so hendi tað ræðuliga: tey vendu Gudi bakið og fóru við bløðandi hjarta inn aftur í Sódomu.

Tí sigur Jesus við okkum øll: Minnist til konu Lots! Eru vit henni lík, eru vit livandi deyð!

Ei byrjað endað er,
tað mást tú skilja.
(Hms. 495)



Konfirmatión í Vesturkirkjuni 11. oktober

Hanus Reinert, Flatnagerði 3, Charles Olsen, Grønlandsvegi 24, Ólavur Debes Arnfriðsson, Frælsið 4, Emil Hermansen, Perskonugøta 6A, Jógvan Olsen, Bóndabrekku 17, Andrea Mouritsen, J. C. Svabos gøtu 12, Hildur Dahl Michelsen, handan Á 6, Pætur Johansen, Lauritsargøtu 9, Hildibrandur Olsen, J. Patursson-ar gøtu 80, Rógvi Heinesen, Dalavegi 35, Andrias Petersen, Lyngøtu 4, Jóhan Petur Johannesen, á Frælsinum 24, Hans Ellefsen, Kráarvegi 4, Eyðun Rasmussen, Skemmingsgøtu 2, Jónleif Anthoniussen, Heygsmannavegi 8A, Kennet Martin Winther Jacobsen, Mýrisnipuvegi 46, Hjálmar Hátún, Heiðavegi 16, Dávur Brøðraberg, Gundadalsvegi 26, John Alfred Würtz, V. U. Hammershaimbs gøtu 14, Jens Hendrik Thomsen, Pedda við Stein gøtu 10, Gunnleyg Árnafjall, Velbastaðvegi 4, **Tórshavn.**
Maud Olsen, Traðargøtu 27, Hanus Debes Joensen, Høvdagøtu 7, Hans Jákup Arge Jacobsen, Heiðatúni 17, Jóhan Marni Stenberg, Traðartúni 6, Dávur Glerfoss, Kráagøtu 4, Kári Egholm, Stoðlagøtu 6, Tove Vivian Andersen, Kráagøtu 7, **Argjum.**

Gudstænastur 17. sunnudag eftir trinitatis

Havnar kirkja: Axel Tórgarð, altargongd
Vesturkirkjan: Høgni Poulsen, konfirmatión
Argir: Kjartan Mørkøre, altargongd
Nólsoy: Hans J. Joensen
Kvívík: Marjun Bæk kl. 12.00
Vestmanna: Gerhard Hansen kl. 12.00, altargongd
Haldórsvík: Martin R. Jacobsen kl. 12.00
Eiði: Emil Olsen kl. 11.00, altargongd. Talvan gongur fyri kirkjuna.
Funningur: Emil Olsen kl. 18.00, altargongd
Elduvík: Torkil Beder, altargongd
Glyvrar: Jákup Kass kl. 11.00, konfirmatión
Sjóvar kirkja: Peter Petersen kl. 12.00, altargongd
Klaksvík: Lestur
Árnafjørður: Ejvind Vilhelm kl. 12.00 og Niels P. Danielsen og Elsa Funding kl. 19.00, altargongd. 50 ára hátíðarhald. Talvan gongur til frama fyri kirkjuna
Sandavágur: David Johannesen kl. 11.00, altargongd
Skálavík: Jákup R. Hansen, konfirmatión
Tvøroyri: Jónsvein Bech kl. 12.00, altargongd
Øravík: Jónsvein Bech kl. 18.00, altargongd
Vágur: Bjarni Bæk kl. 18.00, altargongd

Í Fuglafjarðar, Gjáar, Norðskála, Funnings og í øllum kirkjum í Nes prestagjaldi gongur talvan til frama fyri sunnudagsskúlan

Broytt kirkjutíð

Í Vestmanna, Fuglafirði, Gøtu, á Hellunum og Tvøroyri verður kirkjutíðin í morgin broytt til kl. 12.00

KFUK, Tórshavn

Samkoma teirra eldru verður mánadagin kl. 15.00 v/ Effie Campbell, lærara: »Hin sami sum á døgum Dávids«.
Ungmannadeildin, Várgleði, Titlingarnir og Skótarnir hava ongan fund í komandi viku vegna heystfrí.

KFUM, Tórshavn

Sunnukvøldið kl. 20.30 verður almennur fundur v/ Kaju Babbe, skrivara: »Nakrar hendingar í Nigeria«.

Um nøvn

Prógv

Christa Joan Christiansen, Tórshavn, hevur tikið prógv sum sjúkrasystir á Glostrup sjúkrahúsi.



21. september fingu Ann og Hans Fróði Hansen, Klaksvík, eina dóttur.

1. oktober fingu Brita og Eli Smith, Tórshavn, ein son.

1. oktober fingu Mivi Juul og Leif Ottesen, Funningur, tvíburar, tvær gentur.

2. oktober fingu Tina og Bjarthur Góðadal, Sørvágur, ein son.

4. oktober fingu Sára Joensen og Sam Danielsen, Trongisvágur, ein son.

4. oktober fingu Rannvá og Esmar Andreasen, Hoyvík, eina dóttur.

5. oktober fingu Poula og Tormund Hansen, Skála, ein son.

5. oktober fingu Willy og Pia Bærentsen, Hoyvík, ein son.

6. oktober fingu Olga Joensen og Torkil Strøm, Sandavágur, eina dóttur.

7. oktober fingu Lona og John Jacobsen, Lopra, tvíburar, tveir dreingir.

7. oktober fingu Edny og Kristjan Larsen, Lamba, ein son.

7. oktober fingu Sunneva og Laust Rud Jensen, Nes, ein son.

8. oktober fingu Rósa og Heri Hammer, Klaksvík, eina dóttur.

8. oktober fingu Charlotte Nielsen og Djóni Jacobsen, Tórshavn, ein son.

8. oktober fingu Ingrid Nord og Jóhan Henrik Olsen, Rituvík, eina dóttur.

8. oktober fingu Anny og Andrias, Klaksvík, ein son.

9. oktober fingu Birgit Næss Rasmussen og Jón Gunnarsson, Tórshavn, eina dóttur.

Læknavaktirnar

Tórshavn: Kristianna Nordendal, tlf. 12979, leygardag og Sølvi W. Olsen, tlf. 16611, sunnudag.

Eysturoy: Magnus á Stongum, tlf. 23006, leygardag og tlf. 44038, sunnudag.

Norðuroyggjar: Jaspur Petersen, tlf. 56400

Vágar: Tlf. 32413

Suðuroy (norður): Tlf. 71560

Suðuroy (suður): Tlf. 73030

Tannlæknavakt, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst í dag og í morgin kl. 13.00-14.00. Tlf. 14544.

Til sølu

Runt spísistovuborð diametur 105 cm (kann leingjast til 145 cm), 6 stólar, alt úr furu, og ein Kervel borðovnur

Tlf. 16371

Scania 111

lastbilur við HIAB krana 11t/m, til sølu. Bilurin er í góðum standi.

Sandoyar Bókhaldsvirki
v/ Terja Dalsgaard - Tlf. 61 376 - 210 Sandur